Tjaldur–Sóljan 23–11 (10–6)

# So hevur Tjaldur vunnið

**Fyrsti sigurin hjá tjaldurskvinnunum varð veruleiki, tá tær fríggjadagin høvdu vitjan av Sóljuni**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Tað er so avgjørt eingin loyna, at kvinnuhondbóltsurin í Runavíkini hevur havt tað meira enn torført, meðan Tjaldur hevur verið í fremstu deildini. Hóast royndirnar hava verið nógvar, so var fyrsti sigurin enn ikki komin til høldar, men vónirnar um hendan mundu vera størri fríggjakvøldið, enn tær nakran tíð hava verið áður.

Mótstøðuliðið var Sóljan, sum kom upp í bestu deildina í ár, og hóast Sólan hevði verið við yvirlutan í grundspælinum, so vóru í øllum førum tvær orsøkir til at rokna við, at tað skuldi eydnast hjá Tjaldri hesaferð. Síðani grundspælið hevur Sóljan nevnliga mist týdningarmesta leikara sín til Stjørnuna, samstundis sum Tjaldur hevur styrkt sær um hópin, og vónirnar um sigur mundu ikki minst vera tengdar at teimum báðum útlendsku, Milica Ergic og Jelena Jevtic.

## Tjaldur læsti

Tað vóru eisini serstakliga tær báðar útlendsku, sum vóru hornasteinarnir í sigrinum, sum tað eydnaðist Tjaldri at vinna.

Tá tað kom til stykkis, sýndi máltalvan eisini, at talan hevði verið um ein sannførandi sigur, men at byrja við var als ikki tann stóri munurin á liðunum báðum. Javnt gekk á við málskjótanini, men eftir at gestirnir høvdu lagt seg á odda 6-5, stóð knappliga fast hjá teimum.

Hjá Tjaldrinum gekst heldur so øgiliga væl at skjóta mál hesa løtuna, men tá gestirnir ikki skoraðu, kundu tær á heimaliðnum spakuliga økja, soleiðis at fýra mál vóru á muni í steðginum. Tað er annars merkisvert, at Tjaldur fekk stongt málið beint eftir, at vanligi málverji teirra, Annika Gregersen, noyddist skadd av vøllinum, eftir at hon hevði keikt fótin, men orsøkin til málstongsulin var eisini ein onnur.

Miðverjan hjá Tjaldri stóð seg serstakliga væl, og ungu vágagenturnar megnaðu ikki á nakran hátt at skjóta upp um ella fram við miðblokkinum hjá Tjaldri. Felstu skotroyndirnar vórðu blokkaðar, og hetta bøtti so avgjørt um fortreytirnar hjá Tjaldri fyri at spæla upp á kontra. Í hesum var Beinta Joensen ein sera týdningarmikil liður, tá hon ferð eftir ferð streyk avstað, fyri síðani at enda álopið við at senda bóltin í vágameskarnar.

Gongdin við hesum helt fram, og tað sigur eisini eitt sindur, at eftir at Sóljan hevði skotið sítt sjeynda mál tíðliga í seinna hálvleiki, skuldu ganga 17 minuttir, til nummar átta kom á talvuna.

## Neyðugt við styrki

Niðurstøðan úr dystinum má helst vera, at hesin týðiliga sýndi, hvussu neyðugt tað nú er við útlendskum leikarum, um liðini skulu standa seg í kappingini í fremstu røð. Sóljan hevur eina útendska standandi í málinum, men hendan formáddi sær lítið, móti teimum báðum, sum Tjaldur hevði úti á vøllinum, og tí tykist tað nú sólaklárt, at Sóljan komandi ár aftur noyðist niður í næst bestu deildina.

Framtíðin fyri hondbóltinum í Vágoynni tykist tó ikki so svørt, hóast tær helst noyðast eina deild niður komandi ár. Liðið er í veruleikanum at sammeta við eitt unglingalið, og sum hesar búnast, veðrur møguleikin fyri at standa sjálvsagt alt størri. Sum gongdin er í løtuni, er tað tó ein avgerandi fortreyt, at liðið til ta tíð fær meira styrk av útlendskum leikarum, men tað eru vágafólk helst fullgreið um eftir dystin fríggjadagin.



*Umframt tær báðar útlendsku, tóktist serliga Beinta Joensen at vera ein støðug hóttan móti Sóljuni, tá hon ferð eftir ferð stakk av frá mótstøðukvinnunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**

Tjaldur: Milica Ergic 7(4), Beinta Joesnen 6(1), Ann Mari Østerø 2, Kristine Ellingsgaard 2, Mona Langgaard 2, Jelena Jetic 1, Turid Lamhauge 1

Sóljan: Marjun Jørgensen 4(1), Hertha Simonsen 3, Elspa Egilstoft 1, Sólja Nielsen 1, Fía Selma Nielsen 1, Heidi Maria Akselsen 1

Brotskøst: Tjaldur 6, Sóljan 2

Útvísingar: Tjaldur 2, Sóljan 4

Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Høvdu eitt friðarligt kvøld, sum ikki hevði tørv á eini so ógvuliga harðari hon frá teirra síðu.

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rapa | VÍF | 141 | (31) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 121 | (26) |
| Annika Thomsen | Neistin | 116 | (21) |
| Regina Radó | VB | 116 | (31) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 111 | (38) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 95 | (27) |
| Andrea Lütz | VB | 94 | (9) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 92 | (14) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 89 | (43) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 80 | |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 79 | |
| Gurið Mortensen | VB | 76 | (5) |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 76 | (9) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 65 | |
| Beinta Joensen | Tjaldur | 65 | (11) |

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 162 | (29) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 143 | (43) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 105 | (13) |
| Dorica Tomic | KÍF | 105 | (29) |
| Ingi Olsen | VÍF | 103 | (29) |
| Artur Johansen | StÍF | 97 | (28) |
| Áki Olsen | VÍF | 93 | (8) |
| Sámal Joensen | VÍF | 91 | (6) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 90 | (23) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 81 | (20) |
| Martin Hummeland | VÍF | 77 | |
| Áki Mørk | Neistin | 70 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 69 | (3) |
| Annfinnur N. Debess | H71 | 63 | (4) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 63 | (6) |

## Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 547 | 295 | 252 | 24 |
| 2 | VB | 6 | 4 - 0 - 2 | 466 | 363 | 103 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 5 | 3 - 0 - 2 | 459 | 375 | 84 | 16 |
| 4 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 393 | 387 | 6 | 13 |
| 5 | Kyndil | 6 | 1 - 1 - 4 | 416 | 494 | -78 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 5 | 1 - 1 - 3 | 255 | 443 | -188 | 4 |
| 7 | Sóljan | 6 | 0 - 0 - 6 | 304 | 483 | -179 | 2 |

## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 548 | 411 | 137 | 22 |
| 2 | StÍF | 5 | 3 - 1 - 1 | 493 | 435 | 58 | 15 |
| 3 | Kyndil | 6 | 3 - 1 - 2 | 503 | 458 | 45 | 15 |
| 4 | Neistin | 6 | 3 - 0 - 3 | 431 | 456 | -25 | 12 |
| 5 | KÍF | 5 | 2 - 1 - 2 | 399 | 445 | -46 | 8 |
| 6 | H71 | 6 | 1 - 0 - 5 | 461 | 517 | -56 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 0 - 1 - 4 | 395 | 508 | -113 | 4 |



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

Nørum 160 tons vórðu seld um gólvuppboðssøluna mánadagin. 207 bátar høvdu landað, og framgongur veiðan hjá einstøku bátunum av yvirlitinum niðanfyri, eins og býti millum ymsu fiskasløgini eisini framgongur av talvuni

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 112 | BARMUR | SNELLA | 296 |
| FD 117 | GERÐISBÁTURIN | SNELLA | 64 |
| FD 124 | MÚLATINDUR | SNELLA | 390 |
| FD 15 | ANNA MARIA | SNELLA | 844 |
| FD 160 | SVANANES | SNELLA | 787 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 314 |
| FD 176 | HELEN | LÍNA | 1.049 |
| FD 183 | VÍGDIS | SNELLA | 1.144 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 553 |
| FD 205 | GRETA | SNELLA | 609 |
| FD 222 | GAMLI EDVARD | SNELLA | 416 |
| FD 229 | CAMILLA | SNELLA | 448 |
| FD 283 | ÁLITIÐ | SNELLA | 304 |
| FD 316 | ANNFRÍÐ | SNELLA | 372 |
| FD 322 | KLETTUR | LÍNA | 675 |
| FD 329 | KARIN 3 | SNELLA | 1.676 |
| FD 348 | SKARATINDUR | SNELLA | 340 |
| FD 361 | SÚLAN | LÍNA | 230 |
| FD 377 | JULIA | SNELLA | 618 |
| FD 380 | AMANDA | SNELLA | 752 |
| FD 387 | VOLUNTEER | LÍNA | 118 |
| FD 390 | ELISABETH | SNELLA | 202 |
| FD 418 | EYSTURLÍÐ | SNELLA | 509 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.272 |
| FD 437 | MUNKURIN 3 | SNELLA | 88 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 1.161 |
| FD 472 | STØÐIN | LÍNA | 276 |
| FD 508 | HALGAFELLI | SNELLA | 858 |
| FD 512 | NABBI | SNELLA | 205 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 2.438 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 2.055 |
| FD 571 | DURITA | LÍNA | 661 |
| FD 608 | LAMBANES | LÍNA | 137 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 270 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | LÍNA | 720 |
| FD 718 | LÁGIN | SNELLA | 43 |
| FD 77 | IRDI | SNELLA | 73 |
| FD 771 | KATRIN | SNELLA | 666 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 400 |
| FD 780 | BAKKAFOSSUR | SNELLA | 60 |
| FD 784 | VÓNIN | SNELLA | 1.226 |
| FD 80 | NORÐBÚGVIN | SNELLA | 566 |
| FD 808 | ALMA | SNELLA | 698 |
| FD 84 | JÓN | SNELLA | 72 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | SNELLA | 715 |
| FD 860 | SJÓGUTTIN | LÍNA | 1.263 |
| FD 89 | HØVDIN | SNELLA | 307 |
| FD 900 | HØVNIN | LÍNA | 2.970 |
| FD 905 | TRÚGVI | LÍNA | 914 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 574 |
| FD 956 | ANJA | SNELLA | 176 |
| FD 966 | UNI | SNELLA | 540 |
| FD1019 | HEGRIN | SNELLA | 175 |
| FD1037 | RUTH | SNELLA | 84 |
| FD1096 | RINGLASTEINUR | SNELLA | 73 |
| FD1108 | LUNA | SNELLA | 144 |
| FD1130 | SJÓBÚGVIN | SNELLA | 868 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 675 |
| KG | BIRGITH C. | SNELLA | 56 |
| KG 101 | NEVIÐ | SNELLA | 1.068 |
| KG 106 | BARIÐ | SNELLA | 705 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 669 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 3.426 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 443 |
| KG 143 | KALLANES | SNELLA | 114 |
| KG 170 | ELJAN | SNELLA | 461 |
| KG 171 | NÚPISKLETTUR | SNELLA | 181 |
| KG 189 | VÁTIKLETTUR | LÍNA | 1.700 |
| KG 235 | FLÓÐIN M/B | SNELLA | 116 |
| KG 241 | FREMAD | SNELLA | 395 |
| KG 248 | SJÓSTEINUR | SNELLA | 348 |
| KG 276 | SKORHAMAR | SNELLA | 1.277 |
| KG 288 | HELTNIN | LÍNA | 857 |
| KG 301 | MÁSASTEINUR | SNELLA | 335 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 4.681 |
| KG 334 | NORÐAN | LÍNA | 3.081 |
| KG 335 | SKIPALEITI | SNELLA | 825 |
| KG 37 | LION | SNELLA | 503 |
| KG 407 | JØKUL | LÍNA | 2.968 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 674 |
| KG 450 | ALDAN | SNELLA | 75 |
| KG 47 | HAVSBRÚN | LÍNA | 3.894 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 408 |
| KG 499 | ENNIÐ | SNELLA | 650 |
| KG 543 | HALGAFELLI | SNELLA | 1.426 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 4.329 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 3.998 |
| KG 602 | LÍÐHAMAR | LÍNA | 2.674 |
| KG 603 | SJÓFRÚGVIN | SNELLA | 161 |
| KG 640 | HANSA | SNELLA | 592 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 3.230 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 789 |
| KG 667 | BRIMNES | SNELLA | 812 |
| KG 681 | NESTINDUR | SNELLA | 1.210 |
| KG 703 | HENNY | SNELLA | 473 |
| KG 706 | SKÝLISKLETTUR | SNELLA | 1.016 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 2.253 |
| KG 74 | NESTANGI | SNELLA | 566 |
| KG 740 | HÓPUR | SNELLA | 370 |
| KG 743 | ELSA | SNELLA | 856 |
| KG 744 | OSLA | LÍNA | 3.209 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 2.942 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 789 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 665 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 796 |
| KG 94 | BRID FORD | SNELLA | 857 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 1.405 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 371 |
| SA 350 | HVESSINGUR | SNELLA | 778 |
| SA 38 | VESTURBERG | SNELLA | 2.050 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 464 |
| TG 10 | EVI | SNELLA | 438 |
| TG 14 | HEYKUR | SNELLA | 694 |
| TG 159 | VESTURBÚGVIN | SNELLA | 328 |
| TG 178 | MAJ | SNELLA | 73 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 221 |
| TG 20 | HEIMDAL | SNELLA | 598 |
| TG 22 | HAVGÁSIN | SNELLA | 952 |
| TG 227 | EDVØR | SNELLA | 1.802 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 439 |
| TG 267 | HVÍTIKLETTUR | SNELLA | 469 |
| TG 283 | HERDIS | SNELLA | 393 |
| TG 284 | HAMRABERG | SNELLA | 407 |
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 890 |
| TG 310 | SJÓRIDDARIN | SNELLA | 187 |
| TG 330 | VÍKINGUR | SNELLA | 490 |
| TG 339 | BÁRAN | SNELLA | 212 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 572 |
| TG 376 | DÚGVAN | SNELLA | 458 |
| TG 397 | KVIKK | SNELLA | 259 |
| TG 40 | KAMBUR | SNELLA | 238 |
| TG 401 | BARBARA | SNELLA | 344 |
| TG 422 | BEINTA | SNELLA | 36 |
| TG 435 | JÓRUN | SNELLA | 321 |
| TG 460 | MARIANN | SNELLA | 753 |
| TG 495 | EGIL M | SNELLA | 303 |
| TG 514 | KELDAFOSSUR | SNELLA | 205 |
| TG 523 | SÓLEY | SNELLA | 280 |
| TG 55 | BLÁABERG | SNELLA | 137 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 682 |
| TG 562 | TODNES | SNELLA | 499 |
| TG 597 | TORSTEIN | SNELLA | 710 |
| TG 620 | BERGUR II | SNELLA | 384 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 824 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 1.106 |
| TG 731 | ANNIE M/B | SNELLA | 487 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 1.310 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | SNELLA | 408 |
| TG 808 | POUL S. | SNELLA | 156 |
| TG 91 | STJØRNAN | SNELLA | 526 |
| TG 95 | FLØTUNES | SNELLA | 314 |
| TN 117 | HAVALDAN | SNELLA | 84 |
| TN 136 | BÚGVIN | SNELLA | 790 |
| TN 164 | BORGARKLETTUR | SNELLA | 640 |
| TN 198 | KVÍVÍKS ELSBA | LÍNA | 1.300 |
| TN 213 | LÍRABERG | SNELLA | 130 |
| TN 270 | TORGUN | SNELLA | 696 |
| TN 290 | JUPITER | LÍNA | 1.308 |
| TN 325 | RÁDNI | SNELLA | 850 |
| TN 339 | HERBORG | LÍNA | 865 |
| TN 422 | NÓN | SNELLA | 361 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 2.389 |
| TN 56 | ÁLAFOSSUR | SNELLA | 770 |
| TN 707 | FLUNDRAN | LÍNA | 746 |
| TN 718 | HVÍTABERG | LÍNA | 1.722 |
| TN 723 | BRATTASKORÐ | LÍNA | 646 |
| TN 728 | PANDY | LÍNA | 694 |
| TN 760 | NORÐBORG | SNELLA | 461 |
| TN 81 | THOMMAS | SNELLA | 564 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | SNELLA | 253 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 162 |
| TN 91 | LÓMUR | SNELLA | 333 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 1.175 |
| TN 964 | HVÍTIFOSSUR | SNELLA | 301 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | SNELLA | 573 |
| TN 986 | STJØRNAN | LÍNA | 1.256 |
| VA 97 | NANNY | SNELLA | 38 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 497 |
| VA 111 | SIGGA | SNELLA | 143 |
| VA 125 | LÍRABERG | SNELLA | 760 |
| VA 132 | LÍV | SNELLA | 90 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | SNELLA | 557 |
| VA 190 | SJÓBERIÐ | SNELLA | 322 |
| VA 202 | JENNY D | SNELLA | 173 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 500 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 284 |
| VA 251 | ELVIRA M/B | SNELLA | 224 |
| VA 269 | ANNA MARIA M/B | SNELLA | 786 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 631 |
| VA 287 | SÓLVÁ | SNELLA | 224 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 295 |
| VA 295 | THOVA | SNELLA | 147 |
| VA 304 | JÓNGERÐ | SNELLA | 132 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 1.227 |
| VA 327 | FORTUNA M/B | SNELLA | 271 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 498 |
| VA 350 | SIRIÐ | SNELLA | 1.932 |
| VA 50 | TØÐUBÓNDIN | SNELLA | 54 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 740 |
| VA 717 | STÍGANES | SNELLA | 203 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 534 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 504 |
| VN 132 | TORDIS M/B | SNELLA | 931 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | SNELLA | 436 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 471 |
| VN 430 | RUÐITANGI | SNELLA | 375 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 594 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| TOSKUR 2 | 23.124 |
| TOSKUR 3 | 60.796 |
| TOSKUR 4 | 38.592 |
| TOSKUR 5 | 6.472 |
| TOSKAROGN | 7.499 |
| SIL | 3.132 |
| HÝSA 4 | 99 |
| HVÍTINGUR 0 | 23 |
| LONGA 0 | 58 |
| TOSKUR 1 | 3.199 |
| UPSI 0 | 102 |
| HÝSA 2 | 6.051 |
| HÝSA 3 | 2.613 |
| SKØTA | 6 |
| STEINBÍTUR | 139 |
| HAVTASKA 0 | 50 |
| REYÐSPRØKA 0 | 55 |
| SKRUBBA | 152 |
| ANNAÐ | 5 |
| HÝSA 1 | 5.285 |
| BROSMA 0 | 90 |
| LONGA 3&4 | 1 |
| LONGA 4&5 | 133 |
| KALVI 4 | 15 |
| BROSMA 3&4 | 392 |
| LIVUR | 153 |
| UPSI 2 | 80 |
| UPSI 4 | 70 |
| UPSI 1 | 45 |
| LONGA 1 | 17 |
| BROSMA 2 | 57 |
| LONGA 2 | 73 |
| LONGA 3 | 35 |
| LÝSINGUR | 29 |
| KALVI 2 | 13 |
| KALVI 3 | 7 |
| UPSI 3 | 9 |

# Akraberg eystanfyri

Seinasta mikudag fór Akraberg nýggjan túr eystureftir. Akraberg hevur júst verið í Danmark, har hann hevur verið í dok, og er vorðin sandblástur. Skippari á Akraberg er Eyðun á Bergi.Góð tíð er eystanfyri nú og tað ljóðar at føroysku trolararnir har á leiðini fáa fisk í løtuni. skrivar Norðlýsið í seinastu útgávuni.

Akraberg roynir eystan fyri ein part av árinum og hin partin roynir trolarin eftir kongafiski í Irmingarhavinum. Tá hann er á kongafiskaveiðu leggur hann veiðuna upp í Íslandi, tí siglingartíðina er styttri hagar.

# Søktu boyur hjá Volunter

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Ein línubátur Volunter á Toftum dró hósdagin fýra boyur, sum vóru søktar við byrsu. Volunteer hevði sett nakað innarlaga við Vágoynna. Vágamenn eru illir inn á línuflotan, sum, tá veðrið ikki hevur verið til vildar, hava sett línum næstan inni í briminum.

Vaktar og Bjargingartænastan váttar, at hendingin er farin fram. Vakthavandi sigur seg ongantíð hava vitað um, at nakar hevur gjørt seg inn á línu á hendan hátt og hann metir hetta at vera herverk. Línubátarnir hava loyvi at royna á leiðini.

Tað hendir at línubátar kubba línuna hjá hvørjum øðrum og kanska seta dekan og nógv niður yvir hvønn annan og tað hendir eisini, at ein trolari fer gjøgnum línu, men at boyur verða søktar er ikki hent fyrr.